# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 3418XX

# Bilur út av á Skálatrøð




*Vit hoyra ofta um undirvatnsbátar, men spurningurin er hvat hetta er fyri eitt akfar*
*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

**Um tvey-tíðina mánadagin var ein bilur farin á sjógv á Skálatrøð. At síggja til sá tað næstan út sum um, at bilurin var á veg upp úr sjónum, men tað var altso ikki støðan í hesum førinum.**

FERÐSLUÓHAPP
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Løgreglustøðin í Havn visti ikki heilt hvussu óhappið var hent, men alt bendir á, at bilurin er farin á rull frá parkeringsplássinum og oman á bláman.

– Helst hevur bilførarin gloymt at trekt hondbremsuna, ella er hon gloppin úr, segði vakthavandi á løgreglustøðini í gjár.

Í herinum hava tey eitt, sum tey rópa amfibiakfør, sum eru gjørd til at koyra á bæði á landi og sjógvi, men í hesum førinum kunnu vit róliga staðfesta, at tað var tað ikki talan um á Skálatrøð mánadagin.

– Bilurin er helst rullaður allan vegin oman og er endaður oman á einum báti. Hann hekk síðani fastur í kantinum og fór ikki heilt á sjógv, segði vakthavandi á løgreglustøðini í gjár.

# Intrum í gongugøtuni




*Av misgávum kom henda myndin ikki við í blaðið í gjár, í samband við greinina "Føroyska líkasælan sæst aftur í gjaldsmynstrinum". Her eru starvsfólkini savnaði uttan fyri fyritøkuna í gongugøtuni í Havn. Frá vinstru eru tey: Randi RøsvikHugrún Ósk Bjarnadóttir, Bartal í Gongini, Martin Restorff og Jákup Bech Jensen*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

## Nýggjur portalur um Suðuroynna

Í dag fingu suðuroyingar eina nýggja felagsheimasíðu, sum nokk skal verða nógv vitjað. Suðurrás hevur tikið stig til ein nýggjan Suðuroyarportal, sum hevur til endamáls at varpa ljós á Suðuroynna,

Í tíðindaskrivi verður sagt, at á www.suðurras.fo, sum adressan er, skal meiri gerast burtur úr øllum teimum positivu søgunum, sum hóast alt eru í Suðuroynni, men ikki koma fram í vanligu miðlunum.

– Aðalmálið við Suðuroyarportalinum er at bera tíðindi úr allari Suðuroynni. So at øll kunnu fáa eitt sindur meiri at vita um, hvat fyriferst í Suðuroynni, verður sagt í tíðindaskrivinum, og so verður lagt aftrat, at heimildarfólk úr allari Suðuroynni eru knýtt at Suðuroyarportalinum.

**-rwd**

Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

**Varaleiðara**

at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu

**Vit kunnu bjóða tær**
- eitt spennandi starv, har tú fært høvi at vísa tíni evnir og hugflog
- ein handil við góðum rakstri og spennandi, lívligum umhvørvi
- Løn eftir avtalu og m.a. førleika

**Vit vænta av tær**
- at tú kanst hava ábyrgd av, at handilin altíð er til reiðar at taka móti kundum
- kanst skipa fyri góðari kundarøkt
- at tær dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera
- at tú ert sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum
- at tú hevur kunnleika til handilsyrkið

Meira fæst at vita um starvið við at støkka inn á gólvið ella ringja á tel 312320 el. 217593 og spyrja eftir leiðaranum Bo Møller

Umsókn skal vera okkum í hendi innan 19. oktober, ella skjótast gjørligt

**Keypssamtøkan**
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bo Møller
Fartel 217593
bm@fk.fo

fk